# Álit

# í

**løgtingsmáli nr. 101/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)** (Longd gildistíð, nágreina ella fáa heimildir til at skipa fiskiskapin, at boða frá útluting, at sýta útlendskum skipum at taka ímóti vørum, veitingum og at umskipa o.tíl., at avhenda rættindi at fiska av felagskvotu, at geva undantak frá at landa í Føroyum við fráboðan o.a.)

Bárður á Steig Nielsen, landsstýrismaður í uttanríkis- og fiskivinnumálum, hevur lagt málið fram 6. mai 2026, og eftir 1. viðgerð tann 8. mai 2026 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 11. og 13. mai 2026.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Fiskimannafelagið, Realin, Búskaparráðið, Varðan og Pelagos, Hans Ellefsen, Felagið Peningastovnar og landsstýrismannin í uttanríkis- og fiskivinnumálum, Bárð á Steig Nielsen.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Ben Arabo, Atli F. Johansen, Fía Selma Nielsen, Árni Skaale, Erhard Joensen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Uttanríkis- og fiskimálaráðið metir, at tørvur er á nøkrum nágreiningum og tillagingum í sjófeingislógini.

Gildistíðin á loyvum hevur ikki verið hækkað seinastu árini, soleiðis at loyvini stóðu til at ganga út 1. januar 2034. Hetta verður broytt í uppskotinum, so at loyvini verða longd til 1. januar 2037.

Fiskivinnan er ein kapitalintensiv vinna við dýrum aktivum. Umráðandi er, at karmarnir fyri fiskivinnuna eru stabilir, og at gildistíð á loyvum er nóg long til, at reiðaríini kunnu fíggja skip o.a. á besta hátt. 10 ár verður mett at vera eitt hóskandi loyvistíðarskeið.

Í § 7, stk. 4 verður í verandi lóggávu ásett, at landstýrisfólkið leggur frágreiðing fyri Løgtingið á hvørjum ári. Hetta uppskotið broytir hetta til annað hvørt ár, ið er meira hóskandi. Løgtingið hevur onnur amboð til at taka, um tað vil hava frágreiðingar frá landstýrisfólkinum, og landstýrisfólkið kann eisini av sínum eintingum leggja frágreiðing fyri Løgtingið, um okkurt serligt er at greiða frá.

Broytingarnar, ið verða skotnar upp í § 22, gera tað meira smidligt í ávísum førum at boða frá ásettum kvotum og fiskidøgum við fráboðan heldur enn í kunngerð. Harafturat ger broytingin, at Føroyabanki ikki longur verður skipaður undir serstakari heimild. Undir viðgerðini í Vinnunevndini av hesum máli kom fram, at henda broytingin einki broytir viðvíkjandi eventuellum søguligum rættindum á Føroyabanka.

Uppskotnu broytingarnar í § 26 banna førum undir fremmandum flaggi at umskipa og fáa tænastuveitingar í føroyskum sjógvi uttan loyvi frá landstýrisfólkinum. Henda heimild gevur føroyingum møguleika at handla í samsvari við semjur í økisbundnum fiskiveiðufelagsskapum, og tá fiskiskip, ið hava fiskað av hóttum fiskastovnum, koma í føroyskan sjógv.

Uppskotna broytingin í § 31 a hevur við sær, at rættindi hjá føroyskum fiskiskipum uttan fyri føroyskan sjógv kunnu avhendast øðrum fiskifari við veiðiloyvi fyri eitt fiskiár í senn. Hetta gevur størri smidligheit og betrar um gagnnýtsluna av føroyskum fiskirættindum uttanlands.

Uppskotnu broytingarnar í § 34 eru primert at víðka heimildirnar hjá landstýrisfólkinum við kunngerð at áseta reglur um eftirlit við fiskiskapi, sum er samtykt við grannalondini. Undir hesum eru reglur um handfaring av veiðu, skráseting og annað.

Uppskotna broytingin til § 37 ásetur, at  tað er bannað at blaka ella sleppa veiðu útaftur. Landstýrisfólkið hevur heimild at geva undantak.

Broytingin í § 41 hevur ta broyting við sær, at landstýrisfólkið kann geva undantak frá landingarkravinum við fráboðan heldur enn kunngerð. Hetta ger tað møguligt at handla skjótari. Undir viðgerðini kom fram, at landstýrisfólkið hevur nøkur objektiv metingarstøði at ganga eftir, tá mett verður um, hvørt undantak skal gevast. Hetta er nakað, ið vinnan hevur eftirlýst, og tí er umráðandi, at landsstýrisfólkið konsekvent heldur seg til gjøgnumskygd metingarstøði, tá støða verður tikið í hvørjum einstøkum føri.

Broytingarnar í § 52 geva heimild til at krevja talgilt tilfar í sambandi við avgreiðslu o.a av loyvum. Hetta er gott. Tó eigur tað almenna ongantíð at seta hægri krøv til vinnu og borgarar hesum viðvíkjandi, enn tað almenna setur sær sjálvum.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Eirikur í Jákupsstovu) hevur hesar viðmerkingar:

Flestu broytingarnar í hesum uppskotinum til broyting í løgtingslóg um sjófeingi eru broytingar, sum undanfarna landsstýri eisini hevði á skrá og hevði í hoyring, áðrenn val varð útskrivað í ótíð tíðliga í vár.

Minnilutin tekur undir við flestu av teimum broytingunum, tó við undantaki av at sjófeingisfrágreiðing, sambært hesum uppskotinum, skal veitast Løgtinginum helvtina so ofta, sum higartil, og tí bert skal gevast Løgtingum annað hvørt ár.

Upplýst er fyri nevndini, at tað krevur nakað av arbeiðsorku at gera eina slíka frágreiðing, men samstundis er greitt, at tað kunnu henda stórar broytingar í fiskivinnuni millum ár, og taka vit bara seinasta árið, so eru stórar broytingar hendar í føroysku fiskivinnuni hetta seinasta árið – at viðgera hesar broytingarnar tvey ár eftir, at tær eru hendar, er sera drúgv tíð.

Hartil er greitt, at fiskivinnan er ein sera týðandi vinna fyri Føroyar, og at tað er gagnligt fyri okkum sum fiskivinnutjóð, at vit hava eitt Løgting, sum regluliga fær ítøkiligt innlit og viðger hesa týðandi vinnu, sum byggir á ogn Føroya fólks, í einum opnum forum, sum almenningurin eisini fær innlit í.

Minnilutin metir tí, at tað hevði verið skilagott at hildið fast við, at frágreiðing um sjófeingi verður latin Løgtinginum á hvørjum ári.

Ein munandi broyting er gjørd frá tí, sum undanfarna samgonga millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn arbeiddi við. Tað er broytingin at hækka gildistíðina á veiðuloyvum til 10 ár.

Tað er greitt, at henda broyting ikki hevur verið í almennari hoyring, sum annars er vanlig mannagongd í samband við lógarfyrireikandi arbeiðið hjá landsstýrinum, og sum allar hinar smærru broytingarnar í hesum lógaruppskotinum eisini hava verið.

Landsstýrismaðurin hevur fyri nevndini upplýst, at hann metti tað ikki vera neyðugt at hava hoyring, tí hann longu metti seg kenna argumentini fyri og ímóti longri og styttri loyvistíð.

Minnilutin vísir á, at tað er nýggj mannagongd, um so er, at ætlaðar lógarbroytingar ikki longur skulu til hoyring, um landsstýrisfólkið sjálvt kennir seg nóg væl upplýst.

Hetta undrar serliga, tí loyvistíðin í dag er næstan 8 ár, og tað tí væl hevði borið til at havt veruliga hoyring og lagt uppskotið fyri tingið á ólavsøku, uttan at hetta hevði havt týðandi negativar avleiðingar fyri nakran.

Landsstýrismaðurin hevur upplýst, at orsøkin til ítøkiligu broytingina er, at tað kann hava týdning fyri vinnuna, at loyvistíðin er eitt ávíst áramál, tá stórar íløgur skulu gerast, men at loyvistíðin ikki verður rullandi endurnýggjað fyri at tryggja, at ognarrætturin til fiskirættindini framvegis skal liggja hjá Føroya fólki.

Minnilutin metir, at tað kann hava týdning, at fiskirættindini hava eitt ávíst áramál, men samstundis hava umboð fyri fíggingarstovnar upplýst, at tað ikki hevur týdning, um loyvistíðin er 8 ella 10 ár. Samstundis hevur Búskaparráðið víst á, at ein leinging av fiskirættindunum talar fyri einari hækking av veiðugjøldunum, sum Búskaparráðið í dag heldur vera munandi lægri enn tilfeingisrentuna – eisini hóast gjøldini vórðu hækkað í seinasta valskeiði.

Tað er sostatt greitt, at tað ikki hevur serligan týdning fyri vinnuna, um loyvistíðin er til dømis 8 ella 10 ár, men fyri Løgtingið kann tað hava stóran týdning. Hetta kemst av, at søguliga er eitt valskeið í miðal undir 3 ár, hóast valskeiðið kann vera upp til 4 ár. Tað merkir, at sannlíkt verða fýra komandi Løgting bundin av avgerðini at hækka loyvistíðina til 10 ár.

Tað merkir, at tvífalt so nógv Løgting nú fara at skula til at broyta viðurskiftini við longd av loyvum í fiskivinnuni, sum tað tað til dømis skulu til at broyta Stýrisskipan Føroya, har tað krevst, at tvey fylgjandi Løgting gera broytingina.

Tí metir minnilutin, at tað hevði verið betri við einari ítøkiligari viðgerð av loyvistíðini í sær sjálvum, heldur enn í skundi at broyta skipanina.

Minnilutin leggur tí fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

**1.** Í § 1 verða nr. 1 og nr. 2 strikað.
Nr. 3-13 verða eftir hetta nr. 1-11.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 15. mai 2026**

| | | |
|---|---|---|
| Ben Arabo<br>formaður | Atli F. Johansen<br>næstformaður | Fía Selma Nielsen |
| Erhard Joensen | Árni Skaale | Eirikur í Jákupsstovu |
| | Steffan Klein Poulsen | |